**Størv**

## Stýrimaður og tveir maskinmeistarar

Við hesum verður søkt eftir stýrimanni og tveimum maskinmeistarum til Strandfaraskip Landsins at seta í føst størv frá 1. mars 2000.

Viðkomandi skulu byrja umborð á Tróndi, men skulu til eina og hvørja tíð kunna verða fluttir umborð á onnur skip hjá Strandfaraskipum Landsins sum fyriskipað av leiðsluni.

Stýrimaðurin skal kunna avloysa skiparan, og maskinmeistarnir mynstra sum 2. meistarar og skulu kunna avloysa 1. meistaran.

Arbeiðs- og vaktarskipanin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein er settur umborð á.

**Arbeiðsuppgávurnar umborð**

Høvuðsuppgávan hjá strandfaraskipunum er at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki kring oyggjarnar.

Hjá Tróndi er dagliga farleiðin Skopun-Gamlarætt-Hest.

Arbeiðstíðin er eina viku umborð og síðani ein vika avspáking, og siglt verður hvønn dag í vikuni.

Við Trónda eru skipari, stýrimaður, tveir maskinmeistarar og ein dekkari.

Umstøður eru at búgva umborð.

**Starvið sum stýrimaður fevnir um**

Stýrimaðurin skal syrgja fyri, at trygdarútgerðin umborð er í so góðum standi at øll, bæði manning og ferðafólk, kunnu kenna seg trygg, og annars veita leiðsluni eina skilagóða rakstarfyrisiting.

Stýrimaðurin hevur ábyrgd av, at formligar reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá stýrimanninum eru at vera við til at:

- Tryggja ein støðugan rakstur av skipinum
- Tryggja at trygdin umborð er í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja at skipið verður lasta í samsvari við altjóða krøv
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar.
- Leypandi meta um viðlíkahaldstørvin umborð
- Gera ætlanir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking, herundir viðlíkahaldsmannagongdir.

**Starvið sum 2. meistari fevnir um**

2. meistarin skal vera við til at tryggja, at maskinaríið er í so góðum standi at øll, bæði manning og ferðafólk, kunnu kenna seg trygg, og annars at veita leiðsluni eina skilagóða rakstrarfyrisiting.

2. meistarin skal eisini verða við til at tryggja, at allar lógir og reglur á økinum verða fylgdar, og at arbeiðsgongdin er í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

Aðrar høvuðsuppgávur hjá 2. meistara eru m.a. at vera við til:

- Tryggja ein støðugan rakstur av skipinum
- Hava eftirlit við maskinarínum
- Tryggja gott samstarv við myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Leypandi meta um viðlíkahaldstørvin á maskinarínum
- Gera ætlanir fyri viðlíkahaldsarbeiði og dokking, herundir viðlíkahaldsmannagongdir

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar til stýrimann:
- Útbúgving sum skipsførari

Umsøkjarar til maskinmeistara:
- Útbúgving sum maskinmeistari

**Annars rokna vit við at tú hevur:**

- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Heilsuprógv – ikki eldri enn 2 ár
- Sjón- og hoyrnarroynd ikki eldri ennn 3 ár
- Roykkavara-/sløkkileiðaraprógv – ikki eldri enn 5 ár
- Kunnleika til formlig krøv og royndir viðvíkjandi rakstri av ferðamannaskipum
- Góð samstarvsevnir og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**

Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 11. februar 2000.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Páll Heinesen, starvsfólkaleiðara tlf. 34 30 00 lokal 115, ella e-post: pah@ssl.fo

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

## HD 2. PARTUR

Um nóg stór undirtøka verður, er ætlanin at fara undir HD 2. part í september 2000. Møguleiki er at velja millum 2 breytir, roknskap ella avsetningsbúskap. Spurningurin er, hvør breytin fær størst undirtøku.

Fortreytin at taka HD 2. part er, at tú hevur HD 1. part, HA ella hægri útbúgving.

Áhugað verður biðin at venda sær til skúlan tel. 317177, har meira fæst at vita um HD 2. part.

Freistin at gera vart við seg er 15. februar.

Sosialurin - 311820

**Føroya Handilsskúli**
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • FO-110 Tórshavn

## 50 ára stovningarveitsla hjá Havnar Handverkarafelag

Í sambandi við at Havnar Handverkarafelag verður 50 ár leygardagin 12. februar 2000, verður skipað fyri veitslu í B36-húsinum, kl. 19.00.

Atgongumerki til veitsluna kunnu bíleggjast á tlf. 211540 og 211548 í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2000.

**Nevndin**

## Innskriving av næmingum

til 1. flokk komandi skúlaár verður í skúlanum mánadagin 31. jan. millum kl. 15.00 og 17.00.

Havi dóps ella navnaseðil við.

Velbastaðar skúli
Tlf. 328006

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Kia Sephia GXT Hatcback 1,5 bensin

**Árg.:** 13.12.1996

**KM:** 62.006

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast hjá D. B. Bilar, J. Broncksgøta 15, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Fróði Muller beinleiðis tlf. 34 57 27
fax nr. 34 56 05
at hitta millum kl. 13.00-15.00.

## Teknikari til Auto cad

Søkt verður eftir avloysara til teknideild okkara í umleið seks mánaðir, at byrja 1. mars í ár, ella fyrr.

Arbeiðið umfatar, í høvuðsheitinum fjølbroytt tekniarbeiði við nýmótans útgerð. Luttøka í øðrum arbeiði kann eisini koma upp á tal í mun til tað útbúgving, ið umsøkjarin hevur.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til telefon 314744.

LANDSBYGGIFELAGIÐ P/F
RÁÐGEVANDI VERKFRØÐINGAR

Grønlandsvegur 5
FO-100 Tórshavn
tlf. 314744 fax 310744

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Subaru Forester, 4 WD – Sedan

**Árg.:** 21.06.1999

**KM:** 9.792

Bilurin stendur hjá Tryggingarfelagnum Føroyar á Smyrilsvegnum.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

John Ellefsen tlf. 34 56 00 – beinleiðis tlf. 34 57 26
fax nr. 34 56 05
at hitta millum kl. 09.00-12.00.



FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
**Føroya Gjaldstova**
Traðagøta 39, Postsmoga 2009, FO-165 Argir, Føroyar

Starv á Føroya Gjaldstovu sum

## kervisfyrisitari

er leyst at søkja til setanar beinanvegin:

Í 1997 tók Føroya Gjaldstova nýggja fíggjarstýringarskipan í nýtslu. Skipanin er bygd á Oracle dátugrunnin og verður rikin á einari HP9000 maskinu við HP-UX stýrisskipanini.

Gjaldstovan er í fer við at menna eina nýggja lønarskipan í sama umhvørvi, og er ætlanin, at skipanin verður tikin í nýtslu fyrst í ár 2001. Í hesum sambandi verður søkt eftir dugnaligum fólki til kervisfyrisitanina at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

**Ábyrgdarøki:**
Viðkomandi, ið settur verður, hevur sum arbeiðsøki at fyrisita EDV-kervið og at verða við at innføra nýggju lønarskipanina.

**Av uppgávum kunnu nevnast:**
Vera við í innføringini av nýggju lønarskipanini, t.e. nároyna skipanina, uppseta skipanina, leggja inn stamdáta, gera listar (úrrit).
At fyrisita dagliga raksturin av EDV-skipanini, t.e. stýra brúkara atgongdum, leggja inn og viðlíkahalda koyringar, viðlíkahalda uppsetanina av skipanini, viðlíkahalda og gera nýggj úrrit, inn- og útlesingar av fílum
At kenna skipanina á superbrúkarastøði.
At gera og seta í verk vegleiðingar.
At fyrireika mannagongdir og broyta uppsetan av skipanini so hon til eina og hvørja tíð stuðlar upp undir galdandi mannagongdir. Er ein partur av eini størri heild og skal eisini taka sær av øðrum uppgávum.

**Útbúgving og krøv til viðkomandi, ið verður sett/-ur:**
Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til edv og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggjar uppgávur. Tað er ein fyrimunur, um tú kennir til Oracle og brúkaraamboð knýtt til Oracle, so sum Oracle Data Query og Oracle Report Writer.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu vera Føroya Gjaldstovu í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. februar 2000. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard, edv-leiðara.

**Á gjaldstovuni starvast umleið 30 starvsfólk. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum. EDV-deildin á Gjaldstovuni hevur sum høvuðsuppgávu, at reka, menna og viðlíkahalda landsins roknskaparskipan, eina felags lønarskipan fyri almennu stovnarnar og eitt landsumfarandi nærnet/intranet fyri stovnarnar undir fíggjarmálastýrinum.**

## Vertshúsið



Vertshúsið, sum liggur á Kongabrúnni í Havn, var fyrsta hotell í Føroyum og æt Hotell Djurhuus.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til undirritaðu.

**Demmus Hentze, lrs.**
**Turið Debes Hentze, adv.**
**E. Jalsgøta 1, Tórshavn**
**Tlf. 311460**

## Granskingarverkætlanir innan sjúkufyribyrging í alivinnuni

Vinnumálastýrið skal við hesum kunngera, at á løgtingsfíggjarlógini fyri 2000, konto 6.36.104., er peningur játtaður til granskingarverkætlanir/havbúnaðarroyndir innan:

**Fyribyrging av sjúkum í alifiski.**

Stuðul kann veitast til:
- Tiltøk innan rakstur
- Tiltøk innan sjúkuansing
- Tiltøk sum betra diagnostisku kanningarhættirnar

Undir ávísum treytum, sum eru nærri lýstar á serligum umsóknarblaði, sum umsøkjarar skulu fylla út, kann stuðul verða veittur til granskingarverkætlanir/havbúnaðarroyndir til fyribyrging av sjúkum í alifiski. Verkætlanirnar kunnu fevna um tiltøk innan rakstur, sjukuansing og til betring av diagnostiskum kanningarhættum.

Umsóknarblað kann fáast við at venda sær til avgreiðsluna í Vinnumálastýrinum á telefon nr. 356060, fax nr. 356065, e-post vms@vms.fo , heimasíða www.vms.fo.

Umsóknarblað saman við neyvari lýsing av endamálinum, kostnaði og fígging av verkætlanini, og onnur fyri viðgerðina relevant skjøl, skulu vera Vinnumálastýrinum í hendi í seinasta lagi 29. februar 2000.

**Vinnumálastýrið**
**Vinnumáladeildin**
Postboks 377 • FO-110 Tórshavn
Telefon 356060, Telefax 356065,
E-postur: vms@vms.fo
Heimasíða www.vms.fo

## Maður søkist

til sjálvstøðugt arbeiði. Vanligt koyrikort krevst.

**Skorsteinsóparin**
**430 Hvalvík**
**Tlf. 422456**

## Til sølu



**Peugeot 306 XSI**
10 mánaðar gamal
2.0i 135 HK, el-vindeygu, alu-felgur, centrallás, el-hitaði spegl og setur, dupult airbag, fløguspælari.

Til sølu fyri 128.000
ring og gev eitt boð.

Peugeot 306 XSI
STATIONCAR

**128.000 kr,-**
*ring og gev eitt boð...*

**Heini Mikkelsen, tel 31 87 00 / 24 32 24**

## Turbo Trans-AM til sølu



Av serligum orsøkum og um hóskandi boð fæst, er ein Turbo Trans-Am, modell 1981 av gamla skrokkinum (seinasta modell), til sølu. V8, 301, 4,9 litrar, hevur bert koyrt 64 túsund í alt. T-toppur við øllum. Bilurin hevur tað upprunaliga lakkið (Trans-Am reyður) og er 100% rustleysur, tó er neyðugt at sproyta hann so at hann skal verða fullkomin. Hann hevur havt sama eigara í meira enn 16 ár. Eitt fyrsta floks eintak.

Eigarin, ið vil hava alt fullkomið, hevur endurnýggjað allan motorbúnaðin í bilinum fyri uml. 1.500 túsund ísl. kr. (ca. 150.000 d.kr.) Millum annað er alt nýtt innan í og uttan á motorinum, leiðir og ringar (standard stødd frá GM). Nýggj oljupumpa, bensinpumpa, vatnpumpa, nýggjur knastaksil, undirliggjandi. Alt er nýtt uttan á motorinum til dømis: Nýggjur alternator, nýggjur elektroniskt stýrdur karburator, nýggj telda, ið stýrir karburatorinum, tendringini og automatiskum gearum. Nýggj tendring og tendringskervi, nýggj avgassturbina og dupult útstoytsrør úr rustfríum stáli. Automatiskur gearkassi við automatiskum fjóðra gear (Lock-up). Allur bremsubúnaður er nýggjur frá GM, nýggj dekk frá BF Goodrich, radioal TA framman 245/60 R 15, og 255/60 R 15 aftan. Upprunaligar Turbo Trans-Am felgur av aluminium. Upprunalig svørt innrætting, sær út sum nýggjur innan. Í bilinum er upprunaligur stýribúnaður, ið er sum nýggjur, men nýggjur stýribúnaður frá GM fylgir við og somuleiðis aluminiumsgardinur til afturrútin. Alt arbeiðið er gjørt av einum fakmanni á viðurkendum verkstað. Akfarið hevur altíð verið 100% til sýn. Alt tilfar um bilin er hjá Bileftirliti Íslands. Har kann ein fáa sjón fyri søgn!

Um tú kundi hugsa tær at ogna tær henda sjáldsama dýrgrip, ert tú vælkomin at geva eitt tilboð til:

Jón Sigurðsson
Faxabraut 39, A
230 Keflavík
IS-Ísland
Fax +354 421 2339

Eisini ber til at ringja á tlf. +354 861 3080 (GSM) og fá meiri at vita um bilin annaðhvørt á íslendskum ella enskum máli.

## Viðgerðarstovan



**Erna S. Hákonardóttir**
Alkohol- og Familjuráðgevi

Faklig ráðgeving • »Opin viðgerð« Einstaklingar • bólkar • skeið.

Ringið og fái nærri at vita.
**Tlf. 31 55 45**

## Dagrøktarleiðari

Søkt verður eftir leiðara til dagrøktina á Eiði, at byrja 15. februar.

Skrivlig umsókn verður at senda til Eiðis kommunu innan 10. februar.

Krav: Námsfrøðilig útbúgving.

Nærri fæst at vita á tlf. 423012.

**Eiðis kommuna**
**470 Eiði**